# IKKI BARA LOYNIKRÓKURIN

síða 3

tíðinda sosialurin blaðið

7,-

Nr. 229 ★ mikudagur 30. november 1994

## TRÝ STÓR OLJUFELØG LEGGJA NÚ TIL BROTS:

# Vilja kanna loynidómar í føroyskari undirgrund



Tey trý oljufeløgini Statoil, Mobil og Enterprise vilja saman taka lógvatak um Føroyar. Tey vilja nú kanna loynidómarnar í føroysku undirgrundini. Í gjár vóru umboð fyri feløgini eitt nú á fundi við Oljuráðleggingarnevndina

Síða 13

## Toran sló niður mitt millum fýra mans

Lesið á síðu 9

## TUMMAS ARABO UM ÚTNORÐURSAMSTARVIÐ EFTIR NORSKT NEI:

# Londini í Norðuratlantshavi eiga at finna saman



Lesið um norsku ES-fólkaatkvøðuna á síðunum 6, 9 & 10

## *Trý stór oljufeløg leggja til brots:*

# Vilja kanna loynidómar í føroysku undirgrundini

*Tey trý oljufeløgini Statoil, Mobil og Enterprise vilja saman taka lógvatak fyri Føroyar. Tey vilja kanna loynidómarnar í føroysku undirgrundini, stendur í faldara, tey geva út*

Tey trý stóru oljufeløgini, Statoil, Mobil Oil og Enterprise hava sum tey fyrstu oljufeløgini nakrantíð gjørt eina arbeiðsætlan fyri kanningar á føroyskum øki.

Feløgini vóru á fundi í gjár við oljufyrisitingina, har tey greiddu frá ætlanum og uppskotum sínum.

Í sambandi við hesar fundir hava feløgini gjørt eina brochuru um seg sjálvi og um, hvat tey kundu hugsað sær at gjørt í Føroyum.

Feløgini siga, at tey eru stimbrað av áhugaverdu úrslitunum av leitingini vestan fyri Hetland at fara undir kanningar við Føroyar.

Tey trý feløgini eru ging-in saman í samstarv viðvíkjandi Føroyum. Saman ætla tey sær at fáa hendur á og tulka tilfarið frá seismisku kanningunum sum Western hevur gjørt á føroyska landgrunninum.

Tey trý feløgini siga:

-Vit ætla okkum at kanna loynidómarnar undir føroyska landgrunninum. Vit fara undir hetta samstarv, væl vitandi, at møguleiki altíð er fyri vónbrot tá nýggj útjaðarøki skulu kannast. Men um vónirnar, mong hava til føroyska landgrunnin, gerast veruleiki, so vilja okkara feløg nýta mest framkomnu tøknifrøði og allar okkara royndir til at menna føroysk oljuøki á ein tryggan, umhvørvisvinarligan og lønandi hátt. Við at arbeiða saman kunnu vit skapa virðir, og eina nýggja framtíð fyri Føroyar siga tey trý oljufeløgini í faldaranum tey hava gjørt og almannakunngjørdu í gjár.

**jan**




*Faldarin sum oljufeløgini hava gjørt á føroyskum máli*

**BRÚKTIR BILAR!**

Vit hava nakrar brúkt-ar bilar av ymsum merkjum til sølu.

Yvirlit við upplýsingum um merki, aldur, prísir v.m. fæst við at venda sær til skriv-stovu okkara, eins og sýn/royndarkoyring kann avtalast sama stað.

Rann Teld
v/ Atla Klein Olsen
Postboks 205
110 Tórshavn
Fax: 18703
Tlf 18903 - 88903





*Umboð fyri trý oljufeløg á fundi við Oljuráðleggingarnevndina í gjár. mynd kalmar*